# Føroyskt sum annaðmál
## - skipan og flokking

Undirvísing í føroyskum sum annaðmál til vaksin er skipað í tríggjar leiðir, FSA1, FSA2 og FSA3. Hesar leiðir eru ætlaðar ymiskum luttakarum, hava ymiskt tímatal og enda á ymiskum fakligum stigum.

## 1. Luttakarar

**FSA1** vendir sær í høvuðsheitum til tilflytarar við lítlari og ongari útbúgving og avmarkaðum lesi- og skriviførleikum; og til tey, sum ikki hava lært latínska stavraðið.

**FSA2** vendir sær í høvuðsheitum til tilflytarar, sum hava eina grundútbúgving, sum er nomin í heimlandinum, og hvørs longd er sambærlig við fólkaskúla ella miðnám.

**FSA3** vendir sær í høvuðsheitum til tilflytarar, sum hava nomið sær eina framhaldsútbúgving ella eina hægri útbúgving.

Harumframt verður í sambandi við flokking í leið og stig tikið við:

- yvirskipaðar fortreytir hjá luttakaranum at luttaka í føroyskum sum annaðmál
- mál, sum luttakarin setir sær í føroyskum sum annaðmál
- møguligar starvsroyndir, ætlanir um starv og/ella útbúgving í Føroyum
- málsligir førleikar í føroyskum
- aðrir fremmandamálsligir førleikar og málfatan.

## 2. Upptøkukrøv og visitatión

Lærustovnurin, ið bjóðar út undirvísing í føroyskum sum annaðmál, hevur ábyrgd av at gera eina námsfrøðiliga meting av fortreytunum og førleikastøðinum hjá luttakaranum. Hetta verður gjørt við eini visitatión, har hugt verður at viðurskiftunum, sum eru lýst omanfyri í 1. parti. Visitatión tryggjar, at luttakarin fer á best hóskandi FSA-leið og stig. Á FSA1 verður tó bert visiterað inn á undan A1 og A1. Visitatiónin tekur umleið 45 minuttir.

Luttakarin, sum er meldaður til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, hevur skyldu at vera virkin í undirvísingini. Lærustovnur, ið skipar fyri undirvísingini, hevur skyldu at skráseta, um luttakarin er virkin til staðar.

Treytir í sambandi við depositum og onnur formlig viðurskifti verða ásett í kunngerð.

## 3. Fakligt stig

Fakligu stigini í føroyskum sum annaðmál taka støði í evropeiska CEFR-stiganum[1]. Fakliga innihaldið og førleikamálini á ymsu stigunum eru allýst í námsætlanini.

**FSA1** hevur hesi stig: undan A1, A1, undan A2 og A2

**FSA2** hevur hesi stig: A1, A2, undan B1 og B1

**FSA3** hevur hesi stig: A1, A2, B1 og B2.




## 4. Undirvísingartímar

**FSA1** fevnir um 1000-1200 tímar.

- Øll fýra stigini á FSA1 hava 250-300 tímar hvørt.

**FSA2** fevnir um 700-900 tímar.

- A1 á FSA2 hevur 100-150 tímar
- Hini trý stigini hava 200-250 tímar hvørt.

**FSA3** fevnir um 700-900 tímar.

- A1 á FSA3 hevur 100-150 tímar
- A2 á FSA3 hevur 150-200 tímar

[1] Global scale - Table 1 (CEFR 3.3): Common Reference levels - Common European Framework of Reference for Languages (CEFR)

- B1 á FSA3 hevur 200-250 tímar
- B2 á FSA3 hevur 250-300 tímar.

Talan er her um undirvísingartímar á 45 minuttir hvør. Tímabýtið er vegleiðandi, og kann okkurt fakligt stig taka styttri ella longri tíð.

## 5. At skifta ímillum leiðir og stig

Ein luttakari kann skifta til hægri ella lægri stig ella aðra leið, um luttakarin í samráð við undirvísaran/leiðaran á lærustovninum metir seg fakliga at hava betur gagn av hesum.

Til dømis kann ein luttakari á FSA1, ið skal læra latínska stavraðið, men annars hevur fortreytir at vera á einari av hinum báðum leiðunum, flyta leið, tá ið luttakarin í samráð við undirvísara metir seg vera føran fyri hesum.

Um luttakari eftir lokna leið vil halda fram, er møguleiki fyri at halda fram á næstu leiðini. Tá fer luttakari beint inn á stigið, sum er í framhaldi av lokna stignum. Tað vil siga frá A2 á FSA1 til B1 á FSA2, og frá B1 á FSA2 til B2 á FSA3.

## 6. Stigroyndir og próvtøkur

Tá ið luttakarin hevur lokið øll stigini á síni FSA-leið, verður farið til endaliga próvtøku (sí talvu á síðu 2). Próvtøkur verða hildnar tvær ferðir um árið, og Próvstovan ásetur dagarnar.

Námsætlanin tilskilar próvtøkuháttin á teimum endaligu stigunum. Próvstovan útvegar uppgávur til skrivligu próvtøkurnar. Undirvísarin/lærustovnurin stendur fyri munnliga partinum. Tá ið próvtøkan er staðin, útvegar útbúgvingarstovnurin luttakaranum prógv.

### Próvtøkur

**FSA1** hevur próvtøku á A2

**FSA2** hevur próvtøku á B1

**FSA3** hevur próvtøku á B2.

Á hinum stigunum (undantikið undan A1, undan A2 og undan B1) verður farið til eina stigroynd, sum lærustovnurin skipar fyri (sí gulu strikurnar í talvuni á síðu 2). Lærustovnurin hevur ábyrgd av, at stigroyndirnar verða framdar. Stigroyndirnar hava til endamáls at meta um, hvørt luttakararnir eru klárir at fara víðari til næsta stigið og skulu eftirmeta førleikar luttakarans at lurta, lesa, skriva og tosa.

## Stigroyndir

**FSA1** hevur stigroynd á A1

**FSA2** hevur stigroynd á A1 og A2

**FSA3** hevur stigroynd á A1, A2 og B1.

Á teimum stigum, har hvørki stigroynd ella próvtøka eru, t.e. undan A1, undan A2 og undan B1, verður mælt til, at undirvísarin ger eina formativa eftirmeting saman við luttakarunum, har mett verður um, hvørt luttakararnir eru klárir at fara víðari til næsta stigið.